# Føroya Tele

## Marknaðarfólk

Marknaðardeildin á Føroya Tele hevur seinastu árini ment seg til ein týðandi part av eini fyritøku, sum menninst við rúkandi ferð. Alla tíðina leggjast nýggjar og áhugaverdar tænastur afturat innan øll virkisøki. Hetta er neyðugt til tess at vit varðveita okkara kappingarføri. Til at menna og víðka tænastugrundarlagið víðari tørvar okkum starvsfólk, sum megnar at liva upp til krøvini í okkara broytta umhvørvi.

Starvsøkið er kjarnuøkið hjá Føroya Tele, ið umfatar vanligt fastnettelefoni, ISDN, internet, fartelefonskipanirnar, boðtænastuna og eykatænastur. Í framtíðini koma nógvar nýggjar tænastur, og størri ferð verður á nógvum av verandi tænastum.

Uppgávurnar hjá nýggja starvsfólkinum eru m.a.
- Marknaðarføring
- Tænastumenning
- Søluuppfylging
- Samstarv við søluumboð
- Aðrar dagligar uppgávur á marknaðardeildini

Arbeiðið er sjálvstøðugt, tó í tøttum samstarvi við Marknaðardeildina og aðrar deildir á Føroya Tele. Vit hava hugsað okkum, at rætta starvsfólkið t.d.:
- Hevur hóskandi marknaðarliga/fíggjarliga útbúgving
- Hevur royndir innan sølu, marknaðarføring ella tænastumenning
- Hevur skil fyri og hegni til tøl
- Dugir væl føroyskt
- Dugir at finna kreativar loysnir
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.
- Dugir væl at seta seg inn í nýggja tøkni og at læra frá sær

Heldur tú, at tú kanst hjálpa Føroya Tele við hesum, ert tú vælkomin at søkja, eisini um orsøkin er ein onnur enn tær omanfyri nevndu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvsstaðið er í Havn og starvsbyrjan er skjótast gjørligt. Meira fæst at vita frá Jónhild Rasmussen á tlf. 303030.

Umsóknir skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi seinasta lagi 24. oktober 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
FO 110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355

# SEYÐAKJØT-PRÍSURIN 2000/2001

**Tað verður hervið kunngjørt, at minstiprísurin fyri seyðakjøt fyri 2000/2001 er ásettur at verða**

**kr. 57,00 fyri kg.**

BÓNDAFELAG FØROYA

Sosialurin - 311820

SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI

- Byrjanarundirvísing í føroyskum og enskum
- Altjóða skeið í samstarvi við Cambridge University
- Serskeið eftir ynski

Lætt, stuttligt, mennandi

Tel. 422574 - Fax 422521

www.depilin.fo

Sosialurin - 311820

# Muskelterapeut

VØDDAVIÐGERÐ

Hevur tú:
- høvdupínu • læsta øksl
- músa-arm • knýttar vøddar o.a.
- ella ynskir tú viðgerð fyri vælveru

*Viðgerðartilboðið kann eisini fáast sum gávukort*

Hervør Jacobsen
LÆKNAEXAM. MUSKELTERAPAUT

Tel. 21 30 34
(eftir kl. 16.00 vanl. gerandisdagar, tó ikki hósdag)

Sosialurin - 311820



# GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
# NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
**Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað**

**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

www.danstein.fo

Sosialurin - 311820

# Tvingsilssøla

**Hósdagin 2. november 2000, kl. 09.00,** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 103 og 113 Mikladalur.**

Ognirnar eru ávikavist eitt neyst og eini sethús. Neystið er ca. 26 m². Sethúsini eru 44 m² í kjallara, stovu- og loftshædd, gjørd av timbri og betong og takt við zink. Í kjallaranum er kamar, stórt rúm og eitt lítið brúsirúm við wc. Í miðhæddini er gongd, trappa upp á loft, køkur, stova og eitt lítið kamar. Úr køkinum er niðurgongd í kjallaran. Á loftinum er hjúnarúm, tvey smærri kømur og eitt lítið baðiverilsi við wc, vask og baðikari. Húsini hava eisini ein úbygning. Grundøkið er 118 m² til støddar.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 990223)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya fútarættur,
tann 5. okt. 2000

# ADC-Heilsølan

*Lóarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

ADC

# Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19[00] til 21[00]

☎ 212380

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støðir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

# Føroya størsta úrval av PAKKITILFARI

**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:
- Plastbakkar
- Pakkibond, tape
- Merkir, etikettir
- Knívar
- Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
- Ymisk tól til ídnaðin
- Reingerðisevnir
- Tilsetningsevnir
- Plattar
- Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

FARPACK

*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*

# FLOG-FRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
**Tel. 32 22 22**

Sosialurin - 311820

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

GEVIÐ BLÓÐ



Toll- og Skattstova Føroya, Norðoya Øki

# Starv sum avloysari á Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki, er starv sum avloysari fyri starvsfólk í farloyvi lýst at søkja til setan 1. november 2000 og 6 mánaðar fram.

**Høvuðsuppgávur:**
Málsviðgerð og avgreiðslu innan meirvirðisgjald, skatt, innheinting o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður, skal hava skrivstovuroyndir, og skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða**
eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi,
- klokkuskipan við flextíð, og
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki, Postboks 16, 700 Klaksvík **innan 20. oktober 2000.**

***Um stovnin:***
*Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Norðoya øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 11 fólk.*

Starv

# ROKNSKAPARFÓLK

Fyri framhaldandi at menna fíggjarstýringina m.a. við skrásting av innanhýsis transaktiónum v.m. verður hervið søkt eftir roknskaparfólki (controller) til roknskapardeildina á SL.

**Uppgávurnar hjá roknskapardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá roknskapardeildini er at veita leiðsluni eina úrslitagóða búskapar-fyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Fyriskipan av roknskaparverkinum í fyritøkuni
- Uppsetan av fíggjarætlanum
- Játtanareftirlit
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Innkeyps- og goymslustýring
- Lønarfyrisiting

**Starvið fevnir um**
Tann sum settur verður kemur m.a. at arbeiða við innanhýsis eftirliti, herundir í samstarvi við deildarleiðararnar at menna eina skipan, har allar innanhýsis transaktiónir verða skrásettar og tillutaðar rættað útreiðsluberara.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Játtanareftirlit (samlað og fyri rakstrarstað)
- Uppsetan og viðlíkahald av mannagongdum
- Játtanarlig og roknskaparlig ráðgeving til deildarleiðarar
- Uppsetan av hagtølum
- Ad-hoc lýsingar

**Vit rokna við, at tú:**
- hevur HA, HH ella líknandi prógv
- hevur royndir innan bókhald, grannskoðan e.l.
- er hollur teldubrúkari
- hevur kunnleika og royndir í Navision og Microsoft Office forritunum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva
- hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- hevur góðan røkjuskap

Talan er um eitt starv við stórum og spennandi avbjóðingum, t.e. verða við til framhaldandi at menna fíggjarstýringina á SL og uppbyggja nakrar nýggjar skipanir.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 23. oktober 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Helga Nielsen, roknskaparleiðara, á tlf. 343000 ella senda e-post: hen@ssl.fo.

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Føroya Tele

## Hús at leiga

Til marknaðarstjóra okkara leita vit eftir húsum í Tórshavn ella Hoyvík.
At leiga frá 1. desember.

Áhugað kunnu venda sær til

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
100 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

*NÝTT í 3-aranum*

# FÁ SKIL Á TÍÐINI

# STEMPUL SKIPANIR

**Stempul-inn og stempul-út skipanir**
Til fyritøkur og virkir, ið hava brúk fyri meira enn einum vanligum stempul uri. Serliga vælegnað til flakavirkir o.t.

Skipanin kann setast til PC-ara og gevur eitt lætt og gott yvirlit. Skiftir sjálvt millum summar- og vetrartíð og hevur eisini hópin av øðrum skipanum, so sum flextíðarroknskap, yvirtíðarroknskap, feriuroknskap o.a.

***3-arin umboðar ur- og lása-skipanir hjá Dansk Tidskontrol. Vit hava nógvar loysnir uppá ymsar ur- og tíðarskipanir, sum hóska til fyritøkur, skúlar, ítróttarhallir og virkir í ymsum støddum. Kom inn til okkara og fá eitt prát við okkum um tín tørv.***

3arin

*SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

SANSIR · TEL 355 355

# LÆRLINGUR

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber.

Starvið er fjølbroytt og spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.

Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur FHS ella HH, samstundis er fryntligur og álítandi.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:
**P/f Thomas Dam Ítróttur**
**Postsmoga 268**
**FO-110 Tórshavn**

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 31 14 03 • E-mail: sporthd@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820

# Vegna skeiðvirksemi er mekaniska verkstaðið hjá Ford, Akranesgøta 5, stongt 10. og 11.okt.

P/f Wenzel

Akranesgøta 5 • 100 Tórshavn • tel. 313874/ fax 311173
www.wenzel.fo